umhvørvisstovan

FUGLOYAR KOMMUNA

767 HATTARVÍK
FØROYAR

Argir hin 4. november 2011
Málsnr.: 11/00007-10
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Heidi Hansen

**Spillivatnsætlan góðkend**

Við hesum skal verða boðað frá, at Umhvørvisstovan hin 04.11.2011, sambært § 18, stk. 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, og § 4, stk. 2 í kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn, hevur góðkent spillivatnsætlanina hjá Fugloyar kommunu fyri tíðarskeiðið 2011-2015.

## 1. Umsókn og viðgerð

Umhvørvisstovan fekk hin 16.09.2011 spillivatnsætlanina hjá Fugloyar kommunu til góðkenningar (mál nr. 11/00007-8). Ætlanin er gjørd av HMP Consult, ráðgevandi verkfrøðingum, men hevur Fugloyar kommuna tann 19.09.2011 samtykt ætlanina, ið HMP Consult hevur gjørt (mál nr. 11/00007-9).

Út frá eini heildarmeting av upplýsingunum í ætlanini verður mett, at komandi spillivatnsskipan í kommununi lýkur ásetingarnar í §§ 8-13 í kunngerðini um spillivatn.

Fugloyar kommuna hevur tó søkt um undantak frá ásetingunum í § 10, stk. 1 og § 11, stk. 1 í kunngerðini um spillivatn, sum sigur at spillivatnsútleiðingar skulu leiðast út á sjógv og skulu í minsta lagi verða ein metur undir størstu fjøru.
Í Fugloyar kommunu eru fimm spillivatnsútleiðingar, tvær í Kirkju og tríggjar í Hattarvík. Sum nú er, eru hesar útleiðingar lagdar so langt út á bakkan/oman í fjøruna sum ráðiligt er vegna brim. Um spillivatnsútleiðingarnar skulu liggja 1 metur undir størstu fjøru, verður neyðugt at spreingja helluna, festa og umstoypa rørini, og festa og faststoypa rørini úti í sjónum. Sjálvt við hesi loysnini, verður mett, at ivasamt er um loysnin kann halda í ringa veðrinum.
Ætlanin er tó at umleggja útleiðingarnar í Hattarvík, soleiðis at hesar ikki renna beinleiðis út í áirnar og at leingja hesar oman í fjøruna, so langt sum tað letur seg gera. Útleiðingarnar í Kirkju liggja, sum nú er, heilt oman til bakkan, og verður hetta ikki broytt.

Við omanfyri nevndu grundgevingum, verður undantak givið við heimild í § 11, stk. 2 í kunngerðini um spillivatn.

Góðkenningin umfatar einans krøv ásett í spillivatnskunngerðini, t.v.s. tann umhvørivsliga partin av spillivatnætlanini. Góðkenningin tekur ikki støðu til hvørjar tekniskar loysnir eru valdar og um teknisku viðurskiftini sum heild eru í lagi, so sum dimensionering o.s.fr. Hetta er ábyrgdin hjá kommununi.

Um tað seinni vísir seg, at spillivatnsskipanin elvir til dálking, t.d. uppsavnan av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum, skal kommunan, sambært § 10, stk. 3 í kunngerðini um spillivatn, fremja bøtandi atgerðir, so sum økta reinsing ella føra spillivatnið longur út.

## 2. Kunngerð og kæra

Góðkenningin av spillivatnsætlanini verður lýst á heimasíðu okkara og við almennari lýsing, har tað eisini verður kunnað um at góðkenningin, sambært § 60, stk. 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, kann kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum innan 4 vikur frá at góðkenningin er alment kunngjørd.

Kærurætt hava tey, sum avgerðin hevur týðandi persónligan týdning fyri.

Suni Petersen, settur deildarleiðari

/

Heidi Hansen, umhvørvisviðgeri

**Avrit:** Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postboks 9, FO-110 Tórshavn
HMP Consult, Óluvugøta 12, Tórshavn